

*Gongst sum vestmenningar ætla, verða fleiri vindmyllur at síggja í Føroyum í framtíðini. Men tær fara at hava munandi størri framleiðsluorku enn tann, sum stendur í Neshaganum*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Vilja gagnnýta vindin

**Vindur er varandi tilfeingi, sum vit fáa fyri einki. Honum vilja vestmenningar nú gera gagn av. Teir ætla at fara undir vindmátingar við av vindmylum fyri eyga**

VINDORKA
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:** Ætlanir eru um at fara undir vindmátingar Uppi á Mýrum oman fyri Vestmanna. Tað er felagið Røkt í Vestmanna, sum stendur fyri verkætlanini. At hjálpa sær hava teir fingið fólk frá donsku kanningarstøðini á Risø.

Ein teirra, sum stendur aftan fyri felagið Røkt, er Johan í Niðristovu. Hann sigur at talan er um eitt felag, sum í løtuni rekur aling á Heygadalsvatni í Vestmanna umframt eitt sindur av entreprenørvirksemi.

Í samstarvi við fók frá Risø kanningarstøðini verður farið undir at kanna vind á reyninum vestanvert byrgingina Uppi á Mýrum. Har verður ein mastur sett upp, sum fer at kanna vindferðina í 10 og 30 mertra hædd, sigur hann.

Miðað verður í móti at fara í gongd sum skjótast fyri at fá veturin við og soleiðis fáa eitt so briett støði sum gjørligt at standa á, tá kanningarnar skulu viðgerast.

At tað skal bera betri til hjá felagnum Røkt, enn tað hevur gjørt hjá øðrum, sum fyrr hava roynt, væntar Johan í Niðristovu.

Uttan at gera sammetingar við aðrar royndir, sigur hann tó, at teirra ætlan byrjar við kanningum av vindviðurskiftunum. Tað er, honum kunnugt, ikki gjørt fyrr. Tað hevur heldur verið hinvegin, at farið er í gongd, so so skuldu myllurnar sjálvar koma við kanningarúrslitinum.

Eisini metir hann tað sum eina styrki at hava fingið óheft fólk frá Risø at vera við.

## Gomul ætlan

Talan er í grundini um eina gamla verkætlan, sum teir hava gingið við í fleiri ár, sigur Johan í Niðristovu.

Hon er nú við at búnast, og roynt verður at fáa samstarv í lag við SEV.

– Vit hava havt samband við leiðsluna í SEV, sum virkar positiv fyri ætlanini. Men vit hava enn iki fingið nakað endaligt svar. Kortini halda vit okkum til at fara at gera kanningarnar, tí politiska rákið í løutni er soleiðis, at tað eigur at bera til at sleppa upp í part, sigur hann.

Hann vísir á tað, sum nú hendir á samskiftisøkinum, har eitt felag leigar seg inn á netið hjá einum øðrum.

– Jú at á sama hátt eigur at bera til at gera við orkuna, sum vit fara at fáa burtur úr vins myllunum, sigur hann.

Tað tekniska er ikki nakar trupulleiki longur, sigur hann og vísir á, hvussu væl vindmyllur arbeiða eitt nú í Danmark.

At tað skal bera til fíggjarliga, er hann heldur ikki í iva um, tí vindviðurskiftini eru soleiðis í Føroyum, at ein mylla her gevur umleið tað dupulta av orku, sum ein mylla av sama slag ger í Danmark.

## Støðið

Grundstøðið undir verkætlanini er i lagi, sigur Johan i Niðristovu. Felagið Røkt hevur atgongd til økið, ætlanin er at hava møguliga komandi vindmyllur á.

Peningaliga er felagið so mikið væl fyri, at tað væl ber hesar kanningarnar, hóast eingin studningur verður latin. Verkætlanin er mett at kosta 300.000,- krónur, sigur Johan í Niðristovu.

Hann væntar lágan framleiðslu prís. Umleið sum á vatnorku ella kanska lægri, sigur hann. At so professionellir »analytikarar« eisini eru til at kanna úrlsitini, eigur at betra um møguleikarnar at fáa lækka prísin.

Langttíðar vindmátingarnar aðrastaðni í landinum skulu sammetast við vindmátingarnar á Mýrunum í vetur, sum soleiðis skulu vera við til at avklára vindviðurskiftini á Mýrunum og geva grundarlag fyri komandi niðurstøðum frá Risø.

Vísa royndirnar, at ráðiligt er at fara undir streymframleiðslu, verður væntandi ein mylla sett upp, sum hevur einar fimm-seks ferðir ta orku, sum vindmyllan hjá SEV i Neshaganum hevur, sigur Johan í Niðristovu.





# Hesturin læt lív – maðurin ongan skaða

**Á politistøðini í Runavík ivast tey ikki í, at bilførarin hevði verið í lívsvanda, um hesturin hevði rakt bilin í vinstru síðu, har førarin sat. Alt takið høgrumegin, har hesturin rakti, kleimdist niður av stoytinum**

FERÐSLUÓHAPP
*Vilmund Jacobsen*

Heppin í óhappinum.

Soleiðis kann sigast um bilføraran, sum um 19.30-tíðina mikukvøldið koyrdi á ein hest, sum var sloppin út úr stikinum og gekk á landsvegnum omanfyri Syðrugøtu.

Á politistøðini í Runavík ivast tey ikki í, at bilførarin hevði verið í lívsvanda, um hesturin hevði rakt bilin í vinstru síðu, har førarin sat.

Sýnið var ringt, regn og vindur, tá ið óhappið hendi.

Bilurin rakti hestin í høgru síðu og fórst rættiliga illa.

- Alt takið høgrumegin kleimdist niður, tá ið hesturin rakti og fór aftur við. Vandi hevði verið á ferð, um nakar sat við síðuna av bilføraranum, sigur løgreglan í Runavík.

## Hesturin doyði

So harður var stoyturin, at hesturin, sum er eitt stórt djór og tolir nógv, doyði á staðnum. Hinvegin slapp bilførarin tíbetur uttan mein.

Løgreglan sigur, at hesturin eftir øllum at døma hevði fingið ein dyggan stoyt í hálsin, sum var orsøkin til deyðan.

Spurdur, um ein hestur hevur loyvi at ganga leysur á landsvegnum – til ampa fyri ferðsluna, sigur løgreglan, at tað hevur hann ikki.

- Hesturin hevur staðið í einum stiki og hevði á ein ella annan hátt sloppið sær út um, sigur løgreglan í Runavík.

Eftir hendingina, skipaði løgreglan fyri, at bilur og hestur fingust burtur av landsvegnum.

# Tað ringasta, vit kunnu gera, er at fiska minni

**- Menniskjan er so lítið í mun til náttúruna. Minkar føðin hjá fiskinum, er tað eingin loysn at fiska minni, sigur íslendski fiskifrøðingurin, Jón Kristjánsson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*- Hvar er ábyrgdin hjá fiskifrøðingunum, og hvat hevði hent, um fiskimálaráðharrin hevði fylgt tilráðingini, spyr íslendski fiskifrøðingurin, Jón Kristjánsson*

Kendi íslendski fiskifrøð ingurin, Jón Kristjánsson, hevur í fleiri ár fylgt við tí, sum hendir í føroysku fiskivinnuni.

Nú okkara fiskifrøðingar hava staðfest, at gróðurin og harvið føðin í havinum er lítil í mun til tann fisk, sum er á grunninum, heldur Jón, at tað nyttar einki at minka um fiskiskapin.

- Fiskifrøðingar siga, at tað er meira til av toski og hýsu í ár enn í fjør, og at fiskurin er rak og smáttfallandi. Hetta er ein óheppin støða, og lítið kann gerast til tess at broyta gongdina.

Jón vísir á, at menniskjan er so lítið í mun til náttúruna, men heldur, at einasta gongda leiðin er at fiska so nógv úr stovninum sum tilber, soleiðis at meira verður at eta hjá fiskinum, ið eftir er.

- Tað ringasta, sum føroyingar kunnu gera í eini støðu sum hesari, er at fylgja tilmælunum hjá fiskifrøðingunum um at fiska minni.

## Krónur og oyru

Hann heldur tað vera undarligt, at somu fólk, sum vildu skerja fiskidagarnar í summar við millum 35-50%, nú siga, at meira fiskur er á grunninum, enn teir hildu – og uttan at blunka við!

- Hvar er ábyrgdin, og hvat hevði hent, um fiskimálaráðharrin hevði fylgt tilráðingini?

At enda spyr Jón Kristjánsson, hvat hetta hevði kostað føroyska samfelagnum í krónum og oyrum.

